UTTAN ÚR HEIMI

## Aftur eitt ljóðband

Arabiska sjónvarpsstøðin al-Jazeera sendi gjáranáttina enn eina ljóðupptøku frá yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda.

Hesaferð var tað egyptiski læknin Al-Zawahiri, sum átti røddina, og sum vant var tað USA, sum fekk toyggið. Al-Zawahiri, sum verður roknaður sum næsti maður Osama bin Laden, bað muslimar søkja at sendistovum hjá USA, Bretlandi, Avstralia og Noregi og handilsáhugamálum hjá hesum londunum. Hetta er ikki fyrstu ferð, at Al-Zawahiri hevur hótt Noreg, sjálvt um landið ikki hevur hermenn í Irak. Í oktober í fjør segði hann á einum ljóðbandi, at Noreg er eitt lógligt álopsmál.

Al-Zawahiri legði afturat, at amerikanska frælsisátakið í Miðeystri er ikki annað enn eitt skálkaskjól. Hann vildi vera við, at amerikanararnir vilja hava frælsi til at kúga muslimsk lond, og at teir geva Ísrael frælsi til at kúga palestinar.

## Hava illgruna til norðmenn

Svenska løgreglan heldur seg hava fingið vissu fyri, at tað vóru menn úr Balkan-londunum, sum burturfluttu handilsmannin Fabian Bengtsson í Gøteborg tann 17. januar. Hann varð funnin aftur fjúrtan dagar seinni.

Svensk bløð skriva frá løgreglukeldum, at nakrir av monnunum, sum løgreglan hevur illgruna til, eru norskir ríkisborgarar og búgva í Noregi. Menninir eru limir í einum bólki, sum fæst við rúsevnahandil, og sum eftir øllum at døma stendur á odda fyri einum stórum parti av rúsevnasøluni í vestara parti av Svøríki og í Oslo, skrivar Aftenposten.

Eftir boðum frá svensku løgregluni tók løgreglan í Eysturríki fýra menn, sum vórðu settir í samband við burturflytingina, og ein teirra situr framvegis í varðhaldi í Wien. Svensku myndugleikarnir hava biðið um at fáa hann útflýggjaðan. Tað er komið fram, at maðurin, sum er 27 ára gamal, var ikki í Svøríki, tá Fabian Bengtsson varð burturfluttur, men svenska løgreglan heldur, at tað var hann, sum legði burturflytingina til rættis.

## Rúmdarsteinur fer framvið

Vísindafólk siga seg nú vera komin eftir, at ein rúmdarsteinur fer fram við Jørðini fríggjadagin tann 13. apríl í 2029.

Kanningarnar benda á, at rúmdarsteinurin, sum er einar 400 metrar í tvørmát, verður 30.000 kilometrar frá Jørðini, tá hann fer framvið, og tað merkir, at hann verður nærri Jørðini enn fleiri av teimum støðugu fylgisveinunum, sum vanliga eru 36.000 kilometrar úti í rúmdini. Vísindafólk siga, at tað er eingin vandi fyri, at rúmdarsteinurin rakar Jørðina. Hevði hann rakt Jørðina, hevði bresturin svara til meiri enn 2.000 megatons TNT, og benið hevði vrið einar fýra kilometrar í tvørmát.

Tey, sum hava aldur til tað, kunnu kanska gleða seg til tann 13. apríl í 2029, tí sambært vísindafólkunum fer tað at bera til at síggja rúmdarsteinin, tá hann fer framvið.

## Hitler fingið postkort

Starvsfólkini á høvuðsposthúsinum í Berlin vildu illa trúgva sínum eygum, tá tey nú um dagarnar fingu eit 60 ára gamalt postkort saman við hinum postinum úr útlondum.

Tað sermerkta við postkortinum var ikki bara aldurin, men eisini at postkortið var stílað til "To Fuehrer Adolf Hitler, Reichstag, German Parliamant, Berlin, Germany". Tað stóð ikki, hvør hevur sent kortið. men tað er greitt, at tað er sent úr Onglandi í 1945.

Tann almenna viðmerkingin hjá týska postverkinum er, at postkortið var so nógv seinkað, tí adressan hjá móttakaranum var skeiv. Sendarin átti at brúka adressuna "German Bundestag, 11011 Berlin", sigur týska postverkið.

Hinvegin vil týska postverkið ikki upplýsa, hvat stendur í kortinum til Adolf Hitler.

# Tað verður sum í Helviti

**Iranska prestastýrið slakar ikki fyri trýsti úr Evropa og USA, men hóttir við "einum brennandi helviti", verður landið álopið**

IRAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyrradagin vóru 26 ár liðin síðani kollveltingina í Iran, og í einari røðu nýtti Mohammad Katami, forseti, høvi til at minna fólkið á, at fíggindin hóttir við álopi fyri at fáa iranar at gera, sum Vesturheimurin sigur.

– Øll tann irakska tjóðin fer at svara øllum hóttanum og álopum. Koma álopsmenninir inn um mark okkara, fara vit at svara teimum við einum brennandi helviti, segði forsetin. Hann nevndi einki land, men tað var eingin ivi um, hvat mannfjøldin hugsaði.

– Amerika skal doyggja! Amerka skal doyggja, rungaði tað frá teimum túsundtals áhoyrarunum.

Tær seinastu vikurnar hevur George W. Bush, forseti, hvest orðalagið, tá hann hevur tosað um Iran, og mikudagin segði hann, at iranar mugu skilja, at umheimurin kann ikki góðtaka, at Iran fær sær kjarnorkuvápn. Amerikanska stjórnin heldur, at tey evropeisku londini eiga at leggja størri trýst á stýrið í Teheran, og hetta var eisini eitt av evnunum á Evropaferðini hjá Condoleezzu Rice, uttanríkisráðharra í vikuni.

Vesturlendskir diplomatar í Teheran siga við tíðindastovuna Reuter, at vandin fyri einum amerikonskum álopi á Iran er lítil. Harafturímóti bendir nógv á, at Iran og trygdarráðið hjá ST kunnu bresta saman, tí ST er sera misnøgt við, at leiðarin fyri iranska kjarnorkuverkætlanini hevur sagt, at Vesturheimurin kann ikki steðga iranska verkætlanini.

Amerikonsk bløð vildu í síðsta mánað vera við, at servandir amerikanskir hermenn hava longu verið í Iran og skrásett møgulig bumbumál har.



*Illveður við gloprarregni og vátakava hevur gjørt stóran skaða í Pakistan ta seinastu vikuna*

# Fleiri bygdir skolaðar burtur

**Gloprarregn har suðuri í Pakistan hevði við sær, at ein byrging skrædnaði. Fleiri bygdir eru skolaðar burtur.**

ILLVEÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Áhaldandi gloprarregn í pakistanska landspartinum Baluchistan gjørdi, at Shadikor-byrgingin skrædnaði. Myndugleikarnir siga, at minst tjúgu fólk eru druknað, men teir bera ótta fyri, at talið er størri, tí umleið 700 fólk búðu í bygdunum, sum vórðu skolaðar burtur, tá byrgingin skrædnaði.

– Bygdirnar eru heilt einfalt strikaðar av kortinum, segði ein talsmaður hjá myndugleikunum í gjár.

Umleið 1.200 fólk eru flutt burtur, og í gjár sendi stjórnin hermenn at hjálpa bjargingarliðunum.

Yvirhøvur hevur veðrið verið ringt í Pakistan ta seinastu vikuna við nógvum vindi, gloprarregni og vátakava. Meiri enn hundrað fólk eru deyð, og nógvastaðni eru vegirnir ímillum teir stóru býirnar skolaðir burtur. Nógvar brýr eru eisini farnar.

Pakistonsku veðurmenninir siga, at illveðrið er tað ringasta seinastu sjey árini.